# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Veðurlagsfundurin í Keypmannahavn

Nú mánadagin verður loksins sett hol á nógv umrødda veðurlagsfundin í Keypmannahavn við luttøku av granskarum, vísindafólki, embætisfólki og politikarum úr øllum heimsins londum.

Helst man hetta vera størsta altjóða tiltak, sum nakrantíð hevur verið hildið ikki bert í Keypmannahavn men í øllum Norðurlondum. Tað er greitt, at so stórt tiltak fer av álvara at vera við til at seta fokus á Norðurlond og her ikki minst Danmark. Tað í sær sjálvum er áhugavert, eisini fyri okkum, sum eru partur av einum ríkisfelagsskapi, sum í heimshøpi fyllur rættiliga nógv, tá tosað verður um veðurlagsbroytingar. Her hugsa vit sjálvandi fyrst og fremst um heimsins størstu oyggj, Grønland.

Kjarnin í hesi ráðstevnu ella fundi er, hvussu heimsins lond megna at steðga ella minka um ta dálking og ringu avleiðingar, sum $CO_2$ útlátið hevur.

Fundurin í Keypmannahavn er eitt framhald av tveimum øðrum veðurlagsfundum, tí í Rio de Janeiro og Kyoto. Ávaringarnar frá granskarum og veðurlagsserfrøðingum eru sera víttfevnandi, og taka heimsins lond ikki stig til at minka munandi um útlátið av $CO_2$ komandi mongu árini, so fer tað at fáa vanlukkuligar fylgjur fyri mannaættina verður sagt. Tí liggur í luftini, at luttakararnir á fundinum í Danmark skulu taka avgerðir, sum veruliga fara at merkjast.

Hóast flestu granskarar vilja vera við, at tað fara at henda ógvusligar broytingar í veðurlagnum í framtíðini, um vit ikki royna at minka um ta dálking og yvirupphiting, sum kemur av mannahond, so eru eisini granskarar, sum halda, at alt ov nógv er gjørt av. Hesir vísa m.a. til, at broytingarnar, sum henda í veðurlagnum, í stóran mun koma av náttúrligum orsøkum, eitt nú virkseminum á Sólini. At hesar eru afturvendandi.

Nú beint undan fundinum er komið fram, at granskarar við vilja hava gjørt tølini fyri upphiting meira døpur enn veruleikin er. Hetta greiðir okkara veðurlagsmaður Bogi Eliasen, cand.scient.pol frá aðrastaðni í blaðnum.

Miðlarnir í Miðlahúsinum fara sjálvandi eisini at fylgja fundinum í Keypmannahavn og leggja vit fyri í dag við bakgrundsgrein og analysu, sum Bogi Eliasen hevur skrivað. Eisini fara vit at hava fólk á staðnum.

**Sosialurin**

## Einki sakligt grundarlag undir 10.-floksætlanini

Ætlanin hjá nøkrum limum í Tórshavnar Býráði at savna allar 10. flokkar í Eysturskúlanum er tikin úr leysum lofti, og enn hava hesir býráðspolitikarar ikki megnað at víst á, hvat sakligt og fakligt grundarlag hendan ætlan byggir á.

Ein kann spyrja seg sjálvan, um ætlanin at savna allar 10. flokkar í Eysturskúlanum er partur av onkrum størri politiskum rossahandli, sum vit ikki fáa eyga á beint nú, ella um hetta veruliga eru fáfongdir politikarar, ið fara fram eftir fummum í síni tráan eftir at vísa politiska valdið í verki.

Sama hvussu vit svara hesum spurningi, so er eyðsýnt, at hesi fólkavaldu hugsa ikki um heildina í málinum, tí tey megna ikki at vísa á eitt sakligt og fakligt grundarlag fyri at savna 10. flokk í Eysturskúlanum. Higartil hava vit bara hoyrt politiskar hugsanir, meðan fakligar og sakligar grundgevingar tykjast ikki at finnast.

Vit, sum umboða Tórshavnar Kommunuskúla, kunnu ikki góðtaka, at fólkavald, sum ongan fakligan kunnleika hava, á henda hátt taka avgerðir yvir høvdið á næmingum, foreldrum og teimum, sum dagliga starvast í skúlanum.

Kommunuskúlin hevur í nógv ár havt eitt gott tilboð í 10. flokki, og tað sæst eisini aftur í næmingatølunum. Ein sera stórur partur av næmingunum velur at taka 10. flokk í Tórshavnar Kommunuskúla. Í ár valdu 80 av tilsamans 102 næmingum at halda fram í 10. flokki í Kommunuskúlanum. Til sammetingar kann nevnast, at 53 av 112 næmingum valdu at fara í 10. flokk í Eysturskúlanum.

**Mistulka 10.-floks álitið**

Í einum áliti frá 2007, "10. flokkur – ein øðrvísi skúli", verður Eysturskúlin nevndur sum ein møguleiki at hýsa 10. flokki burturav, tí talan er um eina skjóta og bíliga loysn. Men samstundis verður víst á, at vandin er, at nýggi skúlin tá liggur inni í einum øðrum skúla. Tað tykist sum býráðspolitikarar í óðum verkum hava bitið seg fastar í hendan partin av álitinum, sum lættliga kann gerast ein lappaloysn.

Tann, sum hinvegin lesur álitið við opnum sinni, sær, at besta loysnin er ein serligur 10. floks depil, sum liggur í einum skúla fyri seg, og sum hevur sjálvstøðuga leiðslu og lærarar, ið bert undirvísa á hesum skúla. Tað er ein dýr, men gjøgnumførd heildarloysn, sum heldur inn í framtíðina, og sum byggir á eitt sakligt og fakligt grundarlag. Men neyvan fæst hendan loysnin í bræði, og tískil hevði verið rættast at hugt eftir einari millumloysn við støði í teirri sannroynd, at 10. flokkur virkar væl í Kommunuskúlanum.

Millumloysnin finst eisini í álitinum, har møguleikin fyri tveimum 10. floks deplum verður nevndur – einum í Tórshavnar Kommunuskúla og einum í Eysturskúlanum. Men líka leggja býráðspolitikarar í tað. Tað tykist heldur ikki nerva teir, at lærararnir í Eysturskúlanum fyri fleiri árum síðani savnaðu undirskriftir ímóti at savna allar 10. floks næmingar í Eysturskúlanum. Hetta var langt áðrenn álitið um 10. flokk var skrivað, og lærararnir vístu tá á, at teir stúrdu fyri, hvørjar avleiðingarnar fóru at verða fyri restina av skúlanum, um ein so stórur hópur av 16-17 ára gomlum skuldi stúvast saman í Eysturskúlanum.

Tvs. at besta loysnin finst ikki, fyrr enn ein skúli burturav er funnin til 10. floks næmingarnar í Havnini, sum næsta ár verða tilsamans 180 í tali.

Næstbesta loysnin er so tveir 10. floks deplar, til ein endalig loysn er funnin. Tað undrar, at býráðspolitikarar ikki velja hendan trygga leistin at ganga eftir, men at teir heldur velja at mistulka álitið um 10. flokk og miðvíst royna at drukna málið í undanførslum.

**Undanførslur**

Býráðspolitikarar brúka 10. flokk á Bornholm sum grundgeving fyri ætlanum sínum í Havn. Teir hugsa tó ikki um, at har er talan um ein gjøgnumførda heildarloysn, og at har vóru tey so fræg at spyrja næmingar, foreldur og starvsfólk, áðrenn 10. floks depilin var settur á stovn sum endalig loysn – og ikki sum lappaloysn.

Marin Katrina Frýdal, býráðslimur, og nakrir av hennara samgongufeløgum í býráðnum hava eisini valt at grugga málið við heildarætlanini fyri umvælingarnar í Kommunuskúlanum. Tøl sum 18, 22, 25 og 35 milliónir krónur hava verið nevnd á ein slíkan hátt, at lesarin kann fáa ta fatan, at tað er kostnaðurin fyri at halda fram við 10. flokki í Kommunuskúlanum. Hesi tøl hava einki við 10. flokk at gera, men eru hinvegin politiskt orðaskvaldur í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan og tær umvælingar, sum eru hart tiltrongdar, tí býráðssamgongur í ártíggjur hava latið skúlan farið í misrøkt.

Tað er hugstoytt at hugsa um, at býráðspolitikarar á henda hátt royna at ørkymla borgararnar. Teir áttu ístaðin at sagt fólki sannleikan aftan fyri tær umvælingar, sum nú eru settar á breddan. Men teir velja heldur at tiga burtur ta sannroynd, at tveir næmingar skuldu koma illa fyri í skúlanum, áðrenn Arbeiðseftirlitið tvingaði býráðið at gera ein heildarætlan fyri Tórshavnar Kommunuskúla. Annar næmingurin fekk elektriskan stoyt í skúlanum, og hin var innlagdur á Landssjúkrahúsið, tí hann fekk andatrupulleikar av blámusoppi í skúlanum.

Hóast truplar hølisumstøður hevur Tórshavnar Kommunuskúli megnað at givið 10. floks næmingum góðar námsfrøðiligar umstøður við góðum lærarum. Hesir lærarar hava eisini ein týðandi leiklut í øðrum flokkum, har teir undirvísa. Um 10. flokkur skal úr Kommunuskúlanum verður neyðugt at siga 13 lærararum úr starvi, og tað fær sjálvsagt avleiðingar fyri restina av skúlanum, har lærararnir eisini undirvísa.

Marin Katrina Frýdal segði í telefonviðtalu við ein lærara í Tórshavnar Kommunuskúla 3. november, at "eingin er áhugaður í at knúsa nakað sundur, sum riggar". Men tað verður júst tað, sum hendir, um býráðið heldur fast í ætlanin at savna allar 10. floks næmingar í Eysturskúlanum, tí samstundis verður vælvirkandi skúlaumhvørvið í Kommunuskúlanum sindrað til frama fyri eina loysn, sum eingin kennir.

Skúlastýri og leiðsla í Tórshavnar Kommunuskúla vóna og vænta, at tit fólkavaldu hálsa um og vísa virðing, soleiðis at tit ístaðin fara at arbeiða fyri eini heildarloysn, sum tekur støði í einum sakligum og fakligum grundarlagi.

*Tórshavn, 3. desember 2009*
***Foreldraumboðini í skúlastýrinum í Tórshavnar Kommunuskúla***
**Andrea Heindriksdóttir, forkvinna**
**Henry Olsen, næstformaður**
**Heri Joensen, stýrislimur**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.